

*Edward Fuglø við tveimum av verkunum, sum verða sýnd fram í Havn frá fríggjadegnum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Edward Fuglø sýnir fram í Havn

**Fríggjadagin letur listaframsýning hjá Edwardi Fuglø upp í Galeri Focus í Havn**

LIST

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Edward Fuglø má roknast millum mest spennandi listamenninar í Føroyum, og frá fríggjadegnum sýnir hann nýggja list fram á Galeri Focus í Havn.

- Málningarnir hjá Edward Fuglø hava surrealistiskt sniðeykenni, tað er innihaldsliga ein vend í føroyskari list Surrealisman lýsir veruleikan klæddan i ein annan ham, sum er meira líkur eini dreymaverð, dømi um surrealistiskar málarar eru Max Ernst, Salvador Dali og Yves Tanguy, sigur Galeri Focus um framsýningina.

- Surrealisma er at fara út um veruleikan segði upphavsmaðurin til surrealismuna, rithøvundurin Guillaume Apollinaire í 1917. Í dag er surrealisma ein rørsla stovnað av André Breton í 1924, sum man kann síggja at Edward Fuglø speglar sær í.

# Løgtingslimir eygleiða EFTA-tingnevnd

POLITIKKUR

*Tíðindaskriv*

Miðskeiðis í desember mánaði í ár fáa limir í Uttanlandsnevndini møguleikan at fara til Genevé, har høvuðssætið hjá altjóða handilsfelagsskapinum EFTA liggur. Uppgávan hjá føroysku tinglimunum verður at eygleiða fundir hjá EFTA-tingnevndini. Tað skrivar Uttanríkisráðið.

- Seinasta heyst var tingnevndin hjá EFTA á kunnandi vitjan í Føroyum. Vit reistu tá spurningurin um møguliga føroyska eygleiðarastøðu. Hetta fyri at styrkja vitanina og tilvitanina fyri arbeiðinum hjá EFTA. Vit taka tí væl ímóti innbjóðingini, sum nú er komin sigur John Johannessen, formaður í Uttanlandsnevndini hjá løgtinginum.

EFTA-tingnevndin er ein pallur hjá tingfólkum í teimum fýra limalondunum Íslandi, Liktinstein, Noreg og Sveis at hittast. Yvirskipað nemir tingnevndin við øll mál, sum EFTA viðger. Seinnu árini hevur tingnevndin serliga viðgjørt handilsavtalur við triðjalond, sum EFTA hevur sett í gildið.

- Føroyska eygleiðarastøðan í EFTA-tingnevndini er ein liður í ætlanini at skapa eitt tættari samstarv millum Føroyar og EFTA londini. EFTA hevur sterk handilssambond uttanfyri Evropa, og er í dag tann felagsskapur, ið hevur eina flest fríhandilsavtalur um allan heim. Tað er einki dulsmál, at mongu handilsavtalurnar, sum EFTA hevur við triðjalond, eru av serligum áhuga hjá Føroyum, heldur Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri.




# Motorstopp gav streymslit

**Tað var ein motorur á Sundsverkinum, sum gekk fyri, tá alt meginøkið endaði í streymloysi seinnapartin í gjár**

SEV

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Klokkan var á leið 17.30, tá motorurin steðginum, og trygdarskipanin eftirfylgjandi steðgaði hinum motorunum eisini.

Finn Jakobsen, deildarstjóri á SEV, sigur, at ein motorur á Sundsverkinum brádliga steðgaði. Hetta hevði við sær, at trygdarskipanin, sum verjir teknikkin, gav eitt stoppsignal, so allir motorarnir í skipanini steðgaðu.

Um sekstíðina vóru motorarnir á Sundi og turbinurnar á Eiði komnar í gongd aftur, men trupulleikar við uppstartinum av turbinunum í Vestmanna gjørdu, at tað tók longri tíð enn ætlað at kobla streymin til aftur, sigur Finn Jakobsen.

## Suðuroy og útoyggjarnar undantiknar

Streymurin fór um alt meginøkið. Suðuroy og útoyggjarnar vóru ikki raktar, tí tær eru ikki knýttar í netið í meginøkinum.

Tey fyrstu fingu streymin aftur um hálvgum sjeytíðina, eftir at hava ligið í streymloysi í ein lítlan tíma. Hini fingu streymin aftur hálvan tíma seinni ella so.